# Nissutúrur við sluppini

Aftur í ár skipar Kunningarstovan í Vági fyri sonevndum nissutúri við Johonnu TG 326.

Fyrstu ferð hetta varð roynt, var í fjør, og tiltakið fekk somikið góða undirtøku, at tað mest sum alt fyri eitt varð avgjørt, at hetta skuldi endurtakast.

Ætlandi verður túrurin í ár gjørdur tann 17. desember. Sjálvandi skal veðrið vera til vildar, og um so er, verður loyst frá kaj kl. 13. Siglt verður síðani nakað út á fjørðin, áðrenn skipið verður lagt stilt.

Umframt at tekna seg til ferðina, ella bara at møta upp við keiina, er ein treyt. Øll, sum koma umborð, skulu vera ílatin sum nissur. Komnar umborð fáa nissurnar so heitan nissugreyt við reyðari saft, og so verða nógvir nissusangir sjálvandi eisini sungnir. Og sum skilst, so ræður um at syngja hart. Somikið hart, at jólamaðurin kann hoyra, hvar hann skal koma við pakkunum hendan dagin.

Umframt allan hugnan, sum verður umborð, verður eisini ein serstøk virðisløn latin vakrastu/stuttligastu nissuni.



*Aftur í ár skipar Kunningarstovan í Vági fyri nissutúri við Johonnu TG 326. Eitt tiltak, sum eydnaðist fram úr væl, tá hetta fyri fyrstu ferð varð roynt í fjør*


























